# King Kong og Narnia takast

**Tveir stórfilmar togast í hesum døgum um fólk í biohøllunum kring heimin, og í løtuni er tað King Kong, sum hevur munin á Narnia**

Desember mánaði er vanliga ein tíð við stórum filmum, og í ár eru tað serliga tveir filmar, sum kappast um hyggjarar.

Fyri sløkum tveimum vikum síðani fekk filmurin um King Kong heimspremieru, og hesin filmurin hevur rættiliga tikið allan filmsheimin á bóli. Ummælarar rósa filminum til skýggja, og fólk flokkast í biohøllunum fyri at síggja søguna um King Kong, soleiðis sum leikstjórin Peter Jackson vil hava okkum at uppliva hana.

Eisini í Føroyum verður filmurin sýndur í hesum døgum, og áhugin er sera stórur.

Filmurin um Narnia hevur júst fingið premieru í USA og Onglandi millum annað, og har eru fólk sera spent at síggja filmin.



Narnia-filmurin byggir á eina skaldsøgu hjá C.S. Lewis, og tað er Disney, sum hevur brúkt eina risastóra upphædd til at fáa søguna á hvíta tjaldið. Leikstjóri er Andrew Adamson, sum millum annað hevur gjørt filmarnar um Shrek.

Í USA verður alt gjørt upp í dollarum, og hesa vikuna er King Kong-filmurin ovast á biolistanum, tí hann hevur spælt 50,15 milliónir dollarar í kassan. Narnia er nummar 2 við 31,2 milliónum dollarum.

Á okkara leiðum hevur King Kong verið sýndur í slakar tvær vikur nú, meðan Narnia verður frumsýndur í Havnar Bio og í donskum biohøllum annan jóladag.


























